**Sørvágs Kommuna**

FO-380 Sørvágur · Tlf. +298 332004 & 333122 · Fax +298 332952
E-mail: sokomm@post.olivant.fo

# Kunningarskriv 2001



### *Góðu Bygdafólk*

Árið 2001 er við at fara um havsbrúnna.Tíðarinnar hjól hevur enn eina ferð lagt eitt ár aftur um bak bæði uppá gott og ringt, og enn eina ferð standa vit við ársenda, har gjørt verður upp, hvussu hevur skorist.
Eg skal taka henda tátt upp eftir undanfarna bygdaráðsformann, Petur Kruse, sála , sum byrjaði við kunningarskrivi, har okkara borgarar verða kunnaðir um støðuna í skjótt farna ári.

Fyrsta januar í ár tók nýtt bygdarráð við. Broytingar vórðu gjørdar í einari nýggjari kommunustýrislóg, sum segði, at 7 fólk skuldu manna bygdaráðið, í móti teimum 5, sum høvdu myndað kommununa frammanundan. Krøv um fastar nevndir varð eisini sett fram, og síggjast hesar inni í heftinum. Hesar eru tó ikki allar eitt krav, men nevndir, sum kommunan metir eru neyðugar. Aðrar broytingar, so sum at formaðurin skuldi verða løntur í hálva tíð, var eisini nýtt í mun til tað, sum hevði verið galdandi.

Bygdarráðið hevur havt 18 fundir í skjótt farna árinum, og eru ymisk mál viðgjørd, tó at flest eru byggimál. Nýggja kommunustýrislógin gevur øllum borgarunum rætt at møta á kommunustýrisfundi, og eru hølisviðurskiftina betra munandi í hesum sambandi. Borgarin hevur eisini rætt til at fáa málini lýst, um talan ikki er um persónsmál.

***Fíggjarætlanin fyri 2002***

Fíggjarætlanin hjá Sørvágs Kommunu var til endaliga viðgerð tann 14.11.01 og endaliga samtykt, Metta skattskylduga inntøkan hjá Gjaldstovuni var upp á 118.000.000 kr. Kommunan valdi ikki at vera so bjartskygd í sínum metingum og setti skattskyldugu inntøkuna til 110.000.000 kr., ein vøkstur uppá 10 prosent.Skattaprosentið fyri 2002 verður lækkað við einum ½ prosenti, og er nú komið niður á 20 prosent. Barnafrádrátturin verður óbroyttur 2.500 kr. Sambært fíggjarætlanini er mett, at úrslitið áðrenn avdrátt er 2.085.000 kr.

Inntøkur & Nettoskuld



Sum nakað nýtt er ein 5 ára íløgukarmur gjørdur fyri tær flestu kommunurnar í Føroyum. Hetta er gjørt við tí endamáli at tálma útbyggingum í landinum, sum eru við at taka yvirhond aftur. Landið er deilt upp í økir, har kommunurnar í Vágum eru eitt øki. Ein býtislykil er gjørdur sum sigur so nógvar krónur pr. fólk, og hetta gevur okkum eina íløgukvotu uppá ca 3,3 mió.kr. Men tær kommunur, sum hava valt at taka undir við hesari íløguætlan, fáa 15 prosent omaná, so samlaði íløgukarmurin fyri Sørvág er 3,8 mió.kr Men her til er at siga, at ikki allar íløgur verða vektaðar líka.Havnaútbygging verður bara vektað við 50 prosentum, og keyp av lendi kemur ikki undir íløgukarmin.
Um ein kommuna ikki ger brúk av allari sínari íløgukvotu, kann hon læna einari aðrari kommunu burtur av, men um einki annað er avtalað, skal lánta kvotan fella aftur til tað kommununa, sum hevur lánt íløgukvotu . Upp á henda máta ber til at samla upp til eina størri íløgu, um tað gerst neyðugt.

Íløgukarmurin fyri kommunurnar í Vágum verður samanlagt 11.070.000 kr um árið, ella 55.350.000 kr. í 5 ára avtaluni. Fyri Sørvágs kommunu vil hetta geva sum áður nevnt 3.878.000 kr. um árið ella 19.390.000 kr. í íløgum í hesum tíðarskeiði.Hettar er rættuliga nógvur peningur hjá bygdaráðnum at arbeiða við um fíggjarstøðan loyvir hesum. Í hesum sambandi kan orðatakið nevnast, *at tað skal góður ryggur til at bera góðar tíðir.*
Í framtíðini fara vit at síggja broytingar á tí umsitingarliga økinum.Landsmynduleikarnir hava í longri tíð tosað um,at kommunurnar skulu hava størri ábyrgd av teimum kommunalu uppgávunum. Hettar eiga vit at síggja sum eina avbjóðing, men samstundis vera varin og ikki uttan víðari taka uppgávur upp á okkum, um ikki tann fíggjarligi parturin fylgir við.Um hesar uppgávur verða loystar hvør sær úti í kommununum, eru nokk fleiri boð uppá, ella tær verða loystar í felag.

***Fíggjarætlanin hjá felagskommununi fyri 2002***
Fíggjarætlanin hjá felagskommununi er uppá 217.000 kr. Helvtin av hesari upphædd verður býtt eftir skattskyldugu inntøkuni í kommununum fyri 2000, meðan hin helvtin verður býtt ímillum kommunurnar eftir fólkatalinum tann 01.01.02

***Roknskapurin fyri 2000***
Grannskoðaði roknskapurin hjá Sørvágs Kommunu fyri árið 2000 var framlagdur og góðkendur á fundi tann 29.08.01
Ársroknskapurin vísir eina javnvág upp á 26.809.347kr. Eina fíggjarstøðu, sum javnvigar við 16.549.848 kr. Í fíggjarætlanin fyri 2000 varð roknað við einum avlopi

upp á 4.040.726 kr. , áðrenn avdráttir, men vísir rokniskapurin eitt avlop upp á 5.338.536 kr.




Í seinasta kunningarskrivi varð upplýst at skuldin varð niðurgoldin við 5 mill eyka, so sigast skal, at okkara bygdarfólk hevur lagt rygg til at sloppi okkum burtur úr kreppuni, og goldið okkara skuld niður skjótari,enn okkum var álagt. Hettar eiga vit at leggja okkum í geyma og vera stolt av. Eingin kreppulánsgrunnur hevur sett dagsskránna. Sum nevnt var í seinasta kunningarskrivi, eru øll okkara lán í Føroya Banka, og er skuldin pr. dags dato í Føroya banka. 12.928.948 kr.

***Fólkatalið***

Fólkatalið í bygdini hevur síðani kreppuna verið vaksandi. Í 1999 vóru 888 fólk búgvandi í Sørvági, meðan 28.12.00 vóru 904 fólk. Í dag eru 941 fólk. Hettar er at fegnast um, men ein trupulleiki fyri tey, sum ikki hava ætlanir ella fíggjarligar umstøður at byggja kan vera, at einki fæst at búgva í. Hetta er ikki bert ein trupulleiki í Sørvági, men um alt landið. Hvussu hesin trupulleiki kann loysast, eru nógv boð uppá, men at nýbygging skal vera einasta tilboði, verður ikki nøktandi í framtíðuni av fleiri orsøkum. Í kunningarskrivinum fyri 2001 varð upplýst, at 25 hús stóðu tóm.Hetta talið er ikki minkað stórvegis, og at bert eitt fólk var í 85 húsum, kann, um ikki fólk vilja leiga, gerast ein sera óheppin ringrás. Nnevnast kann, at í 1974 búðu 988 fólk í Sørvági í 294 húsum, í dag búgva 940 fólk í 340 húsum. Í hesum sambandi vil eg biða fólk sum hava hús standandi tóm at hugsa um hettar, sum upp á sikt kann gerast ein kommunalur trupulleiki.

Fólk hava ætlanir um at byggja í komandi ári. Í hesum sambandi skal verða sagt frá, at kommunan hevur nøkur stykkir tøk, men um fólk ynskja stykkir seld, sum líggja

soleiðis fyri, at farast kann undir bygging, so er kommunuskrivstovan sinnað at kunna møguligar keyparar, hvar stykkini liggja og kostnað.

***Teknisk mál***

Ì kunningarskrivinum fyri 2001 varð upplýst,at byggisamtyktin og bygdarplanurin fyri Sørvág var útgingin, men varð longdur fram til 2003. Bygdarráðið hevur sett sær fyri at fáa hettar arbeiðið liðugt til várs. Uppgávuna hevur s/pf West-Tech saman við teknisku nevnd hjá Sørvágs kommunu. Arbeiðið er komið nakað ávegis, og verður bygdarráðið fyrst í komandi ári kunnað um ætlanina. Tekniska nevnd miðar ímóti at arbeiðið verður liðugt í mars mánaða. Síðani skal arbeiðið viðgerast í bygdaráðnum og góðkennast. Eftir at bygdaráði hevur góðkent ætlanina, skal hon lýsast alment.Síðani kann almenningurin mótmæla. Hetta verður gjørt á tann hátt, at byggisamtykt/planur verða løgd fram til almenningin í 3 vikur, og at mótmælast kann í 3 mánaðar.Síðani verða møgulig mótmæli viðgjørd í bygdaráðnum, sum síðan sendir ætlanina annhvørt broytta ella óbroytta til býðarskipanarnevndina til ummælis og góðkenningar.
Hettar er eitt drúgt arbeiði sum tekur tíð, men er tað sera týdningarmikið fyri eina kommunu at hava ein greiðan framtíðarplan, sum røkkur eini 15-20 ár fram í tíðina. Í hesum sambandi kann nevnast, at kommunan arbeiðir við at fáa viðurskiftini rundan um fjøruna og vegin út á kaiøkið upp á pláss. Hetta arbeiði verður gjørt eftir sama leisti. Arbeiði er komið væl áleiðis, og verður hettar arbeiði ein partur av nýggja bygdarplaninum.

Arbeiði at gera umhvørvið hjá okkara borgarum betri, fer at halda fram í komandi ári. Nakað er gjørt tey seinastu árini, men síggjast tey best, nú tey standa liðug. Suðurtriðingsvegurin,sum var eitt stórt arbeiði,er nú um at verða liðugur. Í fíggjarætlanini fyri 2002 er peningur avsettur til at halda fram við hesum arbeiði.

Onnur øki, sum hava ligið á láni, koma nú eisini upp í part. Hettar eru stórar íløgur, sum neyvan verða liðugtgjørdar í komandi fíggjarári. Ì skjótt farna árinum hava verið gjørd arbeiðir, sum borgarin vónandi frøist um. Asvalterað vóru bæði bátahylur og kommunalir vegir. Hetta arbeiði fer at halda fram í komandi ári, saman við øðrum arbeiðum,sum borgarin fer at frøast um. At fara í smálutir við fíggjarætlanini fyri 2002, verður nakað rúgvismikið, men skal verða upplýst, at í fíggjarárinum 2001 var 2,7mill settar av til íløgur, og er henda játtan hækka upp til 3,6mill í komandi ár. Tað vilja altíð verða ymiskar meiningar um raðfestingar, og er fíggjarætlanin fyri 2002 einki undantak.

Ì summar kom fyrispurningur frá Bíggjar kommunu um møguleikan at hava felags brunalið fyri báðar bygdirnar. Eftir at málið hevði verið til viðgerðar á bygdarráðsfundi, var brunaumsjón landsins biðin um at gera eitt upplegg. Á fundi

12.12.01 samtykti bygdaráðið avtaluna, sum varð undirskrivað 28.12.01 av bygdarráðsformonnunum í kommununum báðum. Avtalan tekur við frá 01.01.02, og tað fíggjarliga býtið verður ein býtislykil eftir fólkatalinum.

***Umhvørvið***
Umhvørvið er vorin ein meira tíðandi uppgáva í londunum rundan um okkum tey seinastu árini, men eisini her heima hjá okkum verður gjørt eitt ávíst arbeiði hesum viðvíkjandi. Á hesum øki ætla vit ikki at vera eftirbátur.Á seinasta bygdarráðsfunndi var full semja um at verða við í stovnani av Agenda-21 skrivstovu.
Agenda 21 ( sum merkir skrá fyri 21 øld) er skjal, sum varð undirskrivað á ST-ráðstevnuni í Rio í 1992, har heitt varð á øll lond um, at arbeiða fyri einum reinari umhvørvi og eini betri umsiting av náttúrutilfeinginum. Harafturat skal miðvíst arbeiðast fram ímóti at minka um munin ímillum tann ríka og fátæka partin av heiminum. Lokal Agenda 21 vendi sær til kommunurnar fyri at fáa tær at taka lut í hesum arbeiði.

Endamálið við skrivstovuni verður at veita kommununum, og møguliga øðrum, ið hava hug at arbeiða við Lokal Agenda 21, stuðul og ráðgeving. Hetta arbeiði kann vera alt frá at leggja heildarætlanir fyri kommununa til smærri verkætlanir, so sum grønan skúla, el-og oljusparingar fyri kommununa o.s.fr.

Í vár sendi kommunan skriv út til fólk viðvíkjandi gomlum bilum og øðrum óruddi, sum koma beinleiðis undir umhvørvislógina. Hettar arbeiði fer at halda fram har umhvørvislógin heimilar tí. Annars heita vit inniliga á fólk um ikki at tveita burturkast runt í náttúruni. Er ivi um, hvat skal gerast við burturkast sum ikki skal á ruskplássið, kunnu fólk venda sær til kommunuskrivstovuna tlf. 332004 í millum kl. 08.00 – 17.00 mánadag til fríggjadag.

***Havnaøkið***
Á havnaøkinum er virksemið farið at økjast aftur. Nýggja felagið Vestís – Sea Food, sum byrjaði saltfiskaframleiðslu í oktober, hevur arbeitt so gott sum hvønn dag og arbeiða 15 fólk á virkinum. Fyrst í komandi ári fer Sørvágs Laks undir at slakta, eftir at prísurnir hava verið sera vánaligir, men eru teir spakuliga á veg uppaftur. Leiðslan á Sørvágs Laks roknar við at slaktað verður út í eitt eini 4000 - 4500 tons, og at hettar kemur at geva arbeiði til eini 25-30 fólk. Hettar, saman við aðrari vinnu so sum handils, handverkarvinnu og landingarmiðstøð, fer vónandi at fáa meira virksemi á havnaøkinum aftur.

Í desember mánaða keypti P/F Vesturvón (P/F Rávan ) ísfiskabátarnar Tobas og Særdis frá P/F Snaraløkur við Jónsvein Knudsen í Saltangará , sum nú eita Dragasund og Akranes. Vit ynskja teimum og hinum góða eydnu.

Arbeiðsmynstrið á havnaøkinum er broytt tey seinastu árini. Fyri einum 10 árum síðan fór alt um ein kaikant, og er havnaøkið hjá okkum útbygt soleiðis, at alt skal um ein kaikant.
Her eru broytingar hendar. Ein stórur partur av rávøruni annahvørt kemur ella fer við stórum trailarum sum krevja nógv pláss. Tá upplandið á havnaøkinum er lítið, kemur hettar at hava trupulleikar fyri brúkarnar í framtíðini. Í hesum sambandi hevur kommunan biðið Signar Heinesen,sum í nógv ár hevur verið leiðari á havnadeildini hjá lands-verksfrøðinginum, um at gera eitt uppskot um útbyggingarmøguleikar á havnaøkinum.



Ábøtur vóru gjørdar á træbryggjuna í ár, men her skulu gerðast størri ábøtur í komandi ár á sjálvan betong- plattin.

Hetta var so nakað av tí, vit fyrsta árið kunnu borðreiða við.
Eg vil enda vi hesum orðum " Harmur og gleði í felag tey reika " soleiðis er eisini við hesum skjótt farna ári, sum nú er við at fara aftur um bak. Ikki øll, sum fóru inn í tað nýggja árið, eru ímillum okkum meir. Lagnan vildi tað øðrvísi, og mong eru tey, sum minnast farna árið, sum árið tey mistu tað besta tey áttu. Her vil eg nevna okkara fyrrverandi bygdaráðsformann, Petur Kruse, sum bert fýra mánaðar eftir at hann var liðugur við sína borgarligu skyldu, sum formaður í kommununi, doyði bert 51 ára gamal. Saknurin er tungur hjá øllum sum missa.
Hóast vit hava sungið friður á jørð og í menniskjan góður tokki, so mugu vit ásanna, at hendingarnar kring heimin ikki boða frá hesum, ófriður, kríggj og ivirgangur merkja beinleiðis ella óbeinleiðs gerandisdagin. Vit eiga hóst hettar, at vóna og ynskja øllum eitt gott nýgjár.

Til seinast fara vit at ynskja øllum bygdarfólkinum eitt av Harranum vælsignað nýggjár, Við vónini um at lagnan má laga seg blíð og ljós fyri hvønn einstakan.

Sørvágur, tann 30.12.2001

Eivin H Jacobsen, form

| Sørvágs Kommuna | | Fíggjarætlan 2002 | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | 1997 | 1998 | 1999 | 2000 | 2001 | 2002 |
| Skattskydug inntøka: | 84.054.000 | 89.816.255 | 90.500.000 | 93.700.000 | 100.000.000 | 110.000.000 |
| Skattaprosent: | 21,3% | 21,3% | 21,25% | 21,25% | 20,50% | 20,00% |
| Barnafrádráttur: | 2.500 | 2.500 | 2.500 | 2.500 | 2.500 | 2.500 |
| Kirkjuskattur: | 0,25 | 0,25 | 0,25% | 0,25% | | |
| | | | | | | |
| | Roknskap | Roknskap | Roknskap | Roknskap | Ætlan | Fíggjarætlan |
| | 1997 | 1998 | 1999 | 2000 | 2001 | 2002 |
| **RAKSTUR:** | | | | | | |
| 1000. Byggibúning | 58.232 | 50.417 | 74.628 | 48.460 | 80.000 | 105.000 |
| 2000. Kommunal virkir | 467.788 | 609.180 | 848.827 | 192.340 | 500.000 | 467.200 |
| 3000. Teknisk mál | 2.293.359 | 2.034.522 | 2.510.506 | 2.678.855 | 2.595.800 | 3.424.320 |
| 4000. Skúla- og mentunarmál | 1.979.392 | 2.043.587 | 2.190.179 | 2.228.153 | 2.742.831 | 2.709.971 |
| 5000. Almanna- og heilsumál | 2.288.633 | 2.653.096 | 2.912.921 | 2.174.337 | 4.280.600 | 3.239.360 |
| 6000. Kommunala fyrisitingin | 1.387.658 | 1.627.861 | 1.876.146 | 1.682.269 | 2.340.482 | 1.782.168 |
| 860630. Rentustuðul til landið | Mótr.innt. | 628.901 | 468.614 | 593.271 | 550.000 | 600.000 |
| **A. RAKSTUR SAMANLAGT** | **8.475.154** | **9.647.564** | **10.881.820** | **9.597.685** | **13.089.713** | **12.328.019** |
| | | | | | | |
| **ÍLØGUR:** | | | | | | |
| 1000. Byggibúning | -28.224 | 235.495 | 337.137 | 93.602 | 260.000 | 374.000 |
| 2000. Kommunal virkir | 522.010 | 722.344 | 654.252 | 671.667 | 740.000 | 760.000 |
| 3000. Teknisk mál | 238.946 | 1.438.532 | 2.069.999 | 2.088.488 | 1.440.000 | 1.950.000 |
| 4000. Skúla- og mentunarmál | 176.395 | 216.672 | 123.346 | 52.758 | 294.000 | 392.000 |
| 5000. Almanna- og heilsumál | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 6000. Kommunala fyrisitingin | 34.650 | 0 | 0 | 0 | 0 | 150.000 |
| **B. ÍLØGUR SAMANLAGT** | **943.777** | **2.613.044** | **3.184.734** | **2.906.515** | **2.734.000** | **3.626.000** |
| **RAKSTUR & ÍLØGUR** | **9.418.931** | **12.260.609** | **14.066.554** | **12.504.200** | **15.823.713** | **15.954.019** |
| | | | | | | |
| Rentuútreiðslur: | 1.909.938 | 1.871.540 | 1.231.788 | 1.304.065 | 1.009.000 | 806.000 |
| Rentuinntøkur: | -340.712 | -419.848 | -375.097 | -382.760 | -97.137 | -227.137 |
| **C. RENTUR** | **1.569.622** | **1.451.692** | **856.691** | **921.305** | **911.863** | **578.863** |
| **Avskr. Lán Barnagarðurin:** | | | | **1.045.826** | | |
| **FÍGGJARBROYTINGAR:** | | | | | | |
| Reg. Kreppugr. & Vágatunnilin | 0 | 0 | 0 | 497.409 | -634.348 | 0 |
| Kreppulánsgrunnur | 807.589 | 0 | 0 | -1.708.418 | 0 | 0 |
| Øking av likvidum | 3.459.924 | 1.770.652 | 0 | 0 | 28.982 | 0 |
| Aðrar fíggjarbroytingar | 0 | 0 | 388.695 | 2.056.555 | 482.026 | 243.136 |
| **D. FÍGGJARBROYTINGAR** | **4.267.513** | **1.770.652** | **388.695** | **845.546** | **-123.340** | **243.136** |
| | | | | | | |
| Avdráttur | 1.393.519 | 1.309.497 | 2.278.285 | 6.201.648 | 2.200.000 | 3.174.176 |
| Eykaavdráttur | 0 | 2.000.000 | 2.000.000 | 2.000.000 | 0 | 0 |
| **E. AVDRÁTTUR AV LÁNUM:** | **1.393.513** | **3.309.497** | **4.278.285** | **8.201.648** | **2.200.000** | **3.174.176** |
| | | | | | | |
| **ÚTREIÐSLUR SAMANLAGT:** | **16.649.188** | **18.792.449** | **19.590.225** | **23.518.524** | **18.812.236** | **19.950.193** |
| | | | | | | |
| **INNTØKUR:** | | | | | | |
| Hall at fíggja | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Lántøka | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Minking av likvidum | 0 | 0 | -990.574 | -2.633.669 | 0 | -1.332.454 |
| Avdráttur av útlánum | 58.766 | -47.349 | -494.242 | -1.074.989 | -1.047.000 | 0 |
| Aðrar fíggjarbroytingar | -368.643 | -785.711 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Skattainntøka (netto) | -16.339.315 | -17.959.388 | -18.105.410 | -19.809.867 | -17.765.235 | -18.617.740 |
| **F. FÍGGJAN SAMANLAGT** | **-16.649.192** | **-18.792.448** | **-19.590.225** | **-23.518.525** | **-18.812.235** | **-19.950.194** |
| | | | | | | |
| **ÚRSLIT áðrenn avdrátt:** | **-5.351.158** | **-4.247.087** | **-3.182.165** | **-5.338.536** | **-1.029.659** | **-2.084.858** |

# Sørvágs Kommuna

## Bygdarráðið
Eivin H Jacobsen
Erik Davidsen
Jákup S Lauritsen
Herálvur Jacobsen
Sólva Thomassen
Kristian Olsen
Berg Rasmussen

### Form
Eivin H Jacobsen
**Næst.form**
Erik Davidsen

### Fíggjarnevnd
Eivin Jacobsen form
Erik Davidsen
Herálvur Jacobsen

### Teknisknevnd
Jákup S Lauritsen form
Berg Rasmussen
Kristian Olsen

### Havnanevnd
Kristian Olsen form
Jákup S Lauritsen
Sólva Thomassen

### Heilsunevnd
Berg Rasmussen form
Erik Davidsen
Sólva Thomassen

### Musikkskúlin
Felagskommunan
Herálvur Jacobsen

### Sørvágs bygdasavn
Berg Rasmussen

### Umboð Vesturvón
Eivin Jacobsen

### Umboðsnevnd SEV
Erik Davidsen
Kristian Olsen tilt.

### IRF
Sólva Thomasen
Berg Rasmussen tilt.

### Kommunufelagið
Herálvur Jacobsen
Eivin Jacobsen tilt.

### Felagskommunan
Jákup S Lauritsen
Sólva Thomassen tilt

### Ellisheimið
Sólva Thomassen
Eivin Jacobsen tilt

### Ferðslunevndin
Kristian Olsen

### Valnevndin
Oddur Petersen form
Hans Olsen
Torkil Haraldsen
Verna Rasmussen tilt.
Sjúrður Mikkelsen tilt
Jóndis Mouritsen tilt

### Barnagarðsnevndin
Sólva Thomassen
Jákup S Lauritsen
Jógvan Steintún
Leila Simonsen
Sólva Zakariasen

### Bókasavnsnevndin
Herálvur Jacobsen
Sólva Thomassen
Jákup á Stongum

### Barnaverndin
Oddur Petersen
Ránnvá á Ørg
Eyð Niclasen
Leo-Hans Mikkelsen
Hildigun Niclasen

### Fundir 2002

| | |
|---|---|
| Hós 17.01 | Mik 21.08 |
| Mik 13.02 | Hós 12.09 |
| Mán 11.03 | Mán 07.10 |
| Týs 09.04 | Mán 04.11 |
| Mán 13.05 | Hós 28.11 |
| Týs 25.06 | Mik 11.12 |

Eivin Jacobsen